HEILSANIR

Hey góði elskaði Ísak
Hjartaliga til lukku við 3 ára degnum.
Ynskja omma og abbi

Góðu tit trý
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 21., 25. og 28. Her eru tit lítil og fitt, men nú eru tit bara fitt. Ein heilsan til stóra beiggja.
Ynskja vit

Vit vilja hjartalig takka øllum, sum gleddu okkum við gávum, blómum og fjarritum á hjúnabandsdegi okkara 19. juli 2003 og gjørdu okkum dagin ógloymandi.
Kærar heilsanir Mariann, Jóhan og Hákun Stenberg



Góða fitta Lív
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag 26. sept. Takk fyri tíðina eg var og vitjaði tykkum í Danmark. Vit leingjast eftir tær og vóna, at síggja teg skjótt.
Kærar heilsanir frá okkum Hallur

Góða elskaði Ísak
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum 26. sept. Vit elska teg sooooo nógv.
Mamma og babba

Góða elskaða Sólrun
Hjartaliga tillukku við 9 ára føðingardegnum 25. sept. Alt tað besta í framtíðini, ynskja vit øll.
Hildur og Marjun

Til Jón
Góði Jón. Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum í dag.
Heilsan mamma og pabba

Góða mamma og pápi, omma og abbi, langomma og langabbi
Mamma, hjartaliga tillukku við teimum 90 árunum 26. sept. Vit ynskja tykkum alt tað besta. Má Jesus verða við tykkum í framtíðini.
Gunnar og Tollak við fam.



Góða elskaða Rannvá
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum í dag. Alt tað besta. Vit elska teg.
Ynskir mamma og babba

Elskaða Ró
Hjartaliga tillukku á 1 ára føðingardegnum.
Mamma og pabba



Góða Sanna og Signhild
Hjartaliga tillukku við 6 og 12 ára føðingardøgunum 25. og 26. sept.
Ynskja omma og abbi

Góða Naina
Hon í eini krubbu lá, sum var bæði stór og blá. Hjartaliga tillukku.
Ynskja vit

Heilsanir 30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi 4 miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:...
....
....
....
....
....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ....
Bústaður: ....
Bygd/býur: .... Tlf.: ....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »Heilsanir«

Góða fitta Johanna
Hjartaliga tillukku við piparinum. Vit gleða okkum til ballið.
Ynskja vit

Góða elskaða dóttir og systir
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum. Jesus pápi signi framtíð tína. Takk fyri, at tú er ein so fitt didda.
Heilsan mamma, pápi, Allan og lítladiddan

Góða fitta Kristina
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Lær teg nú at ganga, so tú kann koma at spæla við okkum.
Ynskja Bogi, Beinta og Birita

Góða Kristina
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 26. sept.
Ynskja gumma og gubbi

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Starv sum løgfrøðingur

Á Stjórnardeild Løgmansskrivstovunar er eitt starv sum løgfrøðingur leyst at seta frá 1. desember 2003.

Viðkomandi skal taka sær av løgfrøðiuppgávum í teim málum, ið løgmaður situr fyri, løgfrøðiligari ráðgeving, fyrisitingarpolitikki, uppgávum í sambandi við eftirlit løgmans, stýrisskipan og stjórnarviðurskiftum annars. Harumframt fær viðkomandi møguleika at granska í og viðgera løgfrøðispurningar, sum eru serliga viðkomandi fyri virkisøki løgmans.

Førleikakrøv og royndir
Sett verður sum krav, at umsøkjarar eru útbúnir løgfrøðingar og hava hollar royndir frá privata og ella almenna sektorinum. Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera miðvísir, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava skil fyri teim viðurskiftum, sum eru galdandi í einari politiskari fyrisiting.

Løn- og setanartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingarfelag Føroya. Um viðkomandi, sum settur verður, hevur serligan førleika, er møguleiki at verða settur sum ráðgevi.

Viðkomandi verður settur á Løgmansskrivstovuni, men fer at starvast í hinum stjórnarráðunum í avmarkaða tíð.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum, lívsrensli o.ø. skulu vera Løgmansskrivstovuni, Postrúm 64, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 20. oktober 2003.

Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Barbaru á Tjaldrafløtti, deildarstjóra tlf: 35 10 10, at fáa nærri upplýsingar um starvið.

Løgmansskrivstovan stýðjar løgmanni í at stjórna landsstýrinum og hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja uppgávurnar, sum løgmaður hevur samsvarandi stýrisskipanini, nevniliga at samskipa og hava eftirlit við landsstýrinum, harumframt fyrisiting og uttanríkismál.

EYSTUROYINGAR
Nýtt teoriskeið byrjar hósdagin 25. september
Tilmelding hjá:
Hugo Kristiansen, tel. 225 225
Ole Lykke, tel. 220 972
Eysturoyar Teoriskúli
Sosialurin 341800

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3657
Navn: Sp/f Høgni Zachariasen Holding
Adressa: Niðaragøta 2, íbúð nr. 4, Box 1190, 110 Tórshavn.
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 22.09.2003
Viðtøkudato: 22.09.2003
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Høgni Zachariasen, Niðaragøta 2, íbúð nr. 4, 188 Hoyvík.
Stjórn: Høgni Zachariasen, Niðaragøta 2, íbúð nr. 4, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.04. - 31.03.
Fyrsta roknskaparár: 22.09.2003 - 31.03.2004
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 24. september 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2814, P/F Faroese Spring Water, 490 Strendur.
Nevnd:
Farin frá sum formaður: Eliesar Robert Høj, 490 Strendur.
Innkomin sum formaður: Gunnleiv Danielsen, Korkagøta 1, 100 Tórshavn.
Grannskoðari:
Farin frá sum grannskoðari: Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Innkomin sum grannskoðari: Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.

Skráseting Føroya tann 24. September 2003

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2445, Sp/f Matr. Nr. 247 a, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 03.07.2003.
Nýtt hjánavn: Sp/f Lampubúðin (Sp/f Matr. Nr. 247 a)

Skráseting Føroya tann 24. september 2003

Kristin Balle

Skeiðsdepilin FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN



Málskeið í føroyskum og enskum

Føroyskt mállæra og rættskriving
15 tímar, hósdagar frá 23. okt. til 20. nov. kl. 15.30-18.15

Innihald
- málsøga - ljóðlæra
- bendingarlæra - orðalagslæra
- tekneseting - stórur stavur og lítil
- rættskrivingarreglur - gott og vánaligt mál

Føroyskt fyri útlendingar
36 tímar, mánadagar frá 20. okt. til 19. jan. kl. 16.15-19.15

Innihald
- vant verður í talumáli
- lættari tekstir verða lisnir
- grundreglur í føroyskari mállæru

Business English
24 tímar, hósdagar frá 9. okt. til 6. des. kl. 15.00-17.30

Innihald
- duga at orða teg og svara spurningum á enskum
- duga at nøkta serstakan tørv hjá kundum/fáast við truplar kundar
- gera fundaravtalur, gera ein bókling, ið lýsir tína vøru o.s.fr.

Telephone Service
8 tímar, mikudagar frá 22. til 29. okt. kl. 16.00-20.00

Innihald
- presentera teg og títt arbeiðspláss
- seta innkomandi samrøður ígjøgnum - svara spurningum
- biðja um meira kunning - gera avtalur/fundaravtalur
- Small talk og týdningur tess.

Lesið meira um skeiðini á okkara heimasíðu **www.skeidsdepilin. fo.** har kanst tú eisini tekna teg til skeiðið.

Tilmelding: Í seinasta lagi 1 viku áðrenn skeiðsbyrjan
Skeiðini verða hildin treytað av, at nóg nógvir luttakarar tekna seg.

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn,
Tel 318813, Fax 313374

BØKUR, BØKUR, BØKUR